# Stríðsvalið í Fiskimannafelagnum á Vinnuháskúlanum

Í morgin, hósdagin, klokkan 14 verður almennur kjakfundur á Vinnuháskúlanum, har teir báðir, sum stilla upp til formansvalið í Fiskimannafelagnum fara at dystast, Jan Højgaard og Henrik Old. Fiskimenn atkvøða við uratkvøðu fram til 31. januar, tá talt verður upp. Atkvøðurætt hava allir fiskimenn, sum hava mynstra í 2008 og 2009.





# umøguleikan av landinum

**Landing av føroyskum pelagiskum tilfeingi í Føroyum og uttanlands**

| Landingarprísur | | |
|---|---|---|
| | Sild | 2,50 dkr/kg |
| | Svartkjaftur | 1,50 dkr/kg |
| | Makrelur | 8,50 dkr/kg |

| 2009 | KG | | | | 1000 dkr | | | | | í % | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Til Havbrún | Kollafjørð | Uttanlands | Íalt frá FVE | Til Havbrún | Kollafjørð | Uttanlands | Virði tls | Virði landað uttanlands | Nøgd landað uttanlands | Virði landað uttanlands |
| **Sild í kg.** | | | | | | | | | | | |
| Føroyskir bátar | 15.473.990 | - | 69.469.910 | 84.943.900 | 38.685 | - | 173.675 | 212.360 | | 81,8 | 81,8 |
| Írskir bátar | 2.137.451 | - | - | | 5.344 | 0 | - | 5.344 | | | |
| Íslendskir bátar | 2.503.090 | - | - | | 6.258 | 0 | - | 6.258 | | | |
| **Svartkjaftur í kg.** | | | | | | | | | | | |
| Føroyskir bátar | 27.155.131 | 890.000 | 30.302.869 | 58.348.000 | 40.733 | 1.335 | 45.454 | 87.522 | | 51,9 | 51,9 |
| Norskir bátar | 11.347.525 | - | - | | 17.021 | - | - | 17.021 | | | |
| Íslendskir bátar | 8.870.499 | - | - | | 13.306 | - | - | 13.306 | | | |
| Russiskir bátar | 377.357 | - | - | | 566 | - | - | 566 | | | |
| **Makrelur** | | | | | | | | | | | |
| Føroyskir bátar | - | - | 14.061.900 | 14.061.900 | - | - | 119.526 | 119.526 | | 100,0 | 100,0 |
| Norskir bátar | - | - | - | | - | - | - | - | | | |
| Íslendskir bátar | 7.250.000 | - | - | | 14.500 | - | - | 14.500 | | | |
| Russiskir bátar | - | - | - | | - | - | - | - | | | |
| **Samanlagt pelagiskur fiskur** | **Til Havbrún** | **Kollafjørð** | **Uttanlanda** | **Íalt frá FVE** | | | | | | | |
| Føroyskir bátar | 42.629.121 | 890.000 | 113.834.679 | 157.353.800 | 79.418 | 1.335 | 338.655 | 419.408 | | **72,3** | **80,7** |
| Útlendskir bátar í Føroyum | 32.485.922 | - | - | | 56.994 | - | - | 56.994 | | | |
| Havgøltur írskir bátar | 30.000.000 | | | | | | | | | | |






skipini svartkjaft fyri 45,4 milliónir krónur. Við øðrum var virðið avreitt uttanlands 51,9 prosent og virðið avreitt í Føroyum 48,1 prosent.

Sum nevnt omanfyri avreiddu uppisjóvarskipini allan makrelin uttanlands. Seta vit meðalprísin til 8,50 krónur fyri kilo, avreiddu skipini makrel fyri 119,5 milliónir krónur í øðrum londum.

Samanlagt var virðið avreitt uttanlands 80,7 prosent av tí samlaða avreiðingarvirðinum ímóti 19,7 prosent avreitt í Føroyum.

## Frítt at avreiða

Meðan íslendsk og norsk uppisjóvarskip sum meginregla skulu avreiða fiskin í heimlandinum, kunnu tey føroysku uppisjóvarskipini avreiða, har tey vilja.

Í fiskimálaráðnum verður sagt, at tað stendur einki í veiðiloyvunum hjá uppisjóvarskipunum, hvar veiðan skal avreiðast. Sagt verður, at føroysk lóggáva áleggur ikki skipum at avreiða á ávísum staði, men lógin heimilar myndugleikunum at revsa skip, um tey avreiða meiri enn ein ávísan part av veiðini uttan fyri Føroyar. Hendan reglan er tó bara galdandi fyri botnfisk, sum er veiddur undir Føroyum ella Íslandi.

Í grein 9 í kunngerðini hjá íslendska fiskimálaráðnum um svartkjaftaveiði hjá íslendskum skipum stendur, at veiðan skal avreiðast og vigast í íslendskari havn. Tað sama stendur í grein 5 í kunngerðini um veiði hjá íslendskum sildaskipum. Í báðum førum kunnu skip søkja um loyvi at avreiða í útlendskari havn.

Tað er tó ein sannroynd, at bæði íslendskir og norskir myndugleikar hava sett ymsar tekniskar handilsforðingar, sum avmarka møguleikarnar hjá teirra skipum at avreiða uttanlands.